

*Í 2006 fingu Elsa og hennara vitjan av kristnum etiopiskum fiskimanni Wondu, sum sigldi við russiskum fiskiskipi. Wondu hevur eisini upplivað kommunismuna. Í skúlanum høvdu tey frálæru um marx-leninismuna. Tey skuldu ganga kravgongu fyri hesa "trúgv". Tá plagdu tey at ganga framvið líkum, sum lógu framvið vegjaðaran. Hetta var fyri at vísa næmingunum, hvussu tað kundi gangast teimum, sum viku frá "røttu" læruni. Wondo varð sendur til Russland fyri at fáa kunnleika um fiskivinnu. Men hann bleiv verandi. Johan Christiansen, mitt í myndini, sum er havnaumsjónarmaður í Havn hevði skipað fyri vitjanini. Zacharias í Mortanstovu í grannalagnum var eisini komin inn á gólvið. Elsa sæst við bakinum til*

okkara landi. Men hoyra tey ikki Guds orð kunnu tey ikki verða frelst.

Tey seinastu umleið 60 árini hevur Gud sent veking í Etiopia. Ja, kanska tað størstu veking, sum verið hevur í søguni.

Fólk koma til samkomurnar í kirkjunum, á missiónsstøðum og úti í bygdunum. Tey hoyra gleðiboðskapin um Jesus. Summi reisa seg, rætta hendurnar upp og siga at tey vilja vera kristin. Ofta havi eg hugsað um tað, sum stendur í Sálmi 68,32: "Blálond skulu bráddliga rætta hendur til Guds."

Hetta at tey rætta hendurnar upp er ein vitnisburður um, at tey vilja venda heiðinskapinum bakið og vilja fylgja Jesusi eftir.

*Jesus segði: "Tann sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur. Jóhs. 6,37*

Hesi mugu lærast upp í Guds orði. Her er tað, at tað stendur á.

*Akurskurðurin er mikil, men arbeiðsmenninir eru fáir. Biðið tí hann, sum akurskurðin eigur, at hann vil senda út arbeiðsfólk at heysta unn skurðin. Matt. 9,37-38.*

Eg takki Gudi fyri øll tey ríku ár, sum hann gav mær í tænastuni í Etiopia. Eg takki eisini Kirkjuliga Missiónsfelagið, sum sendi meg til Etiopia og øllum, sum hava biðið fyri mær. Eisini takki eg fyri tey, sum góvu og framvegis geva til arbeiðið, sum hann hevur litið okkum til millum fólkasløgini. Størsta tøkkin fer til Harran, sum kallaði meg og setti meg til tænastu, hóast hann visti alt um meg, áðrenn hann kallaði meg. Enn er so nógv ógjørt. Jesus roknar við, at vit sum fingu boðini fyrst, skulu bera tey víðari til teirra, sum ikki hava fingið innbjóðingina. Hetta er okkara ábyrgd.



*Norðragøtu umleið 1930. Niðanfyri vegin er fremst húsini "hjá Peri", har Elsa vaks upp. Her býr nú Jóhannes við húski. Aftanfyri sæst gamla Mortanstova.* ***Omanfyri vegin er:*** *Veggur av gomlu Frammistovu, Glyvra Hanusarhús, Blásastova, Hjá Ísaki, Tjørnustova, á Heimara Fløtti og á Fløtti.*

## Tøkk til Elsu

Nú eru vit komin til endan á hesi frásøgnini hjá Elsu Jacobsen. Røðin gjørdist drúgvari enn roknað varð við at byrja við. Sum frá leið vísti tað seg at vera so nógv tilfar sum mátti við afturat fyri at gera frásøgnina meira fullkomna. Hetta er tilfar sum alt viðvíkir umstøðum og persónum, sum Elsa sjálv hevur kent. Í summum førum er tilfar fingið frá øðrum keldum fyri at gera frásøgnina meira fullfíggjaða.

Afturfyri hava vit so fingið eina sera spennandi og áhugaverda søgu. Dentur hevur verið lagdur á í fyrsta lagi at lýsa tað missiónsvirksemi, sum Elsa hevur verið við í. Í øðrum lagi at geva eina lýsing av Etiopia, landi og fólki og í triðja lagi at lýsa Etiopia undir kommunistiska stýrislagnum.

Alt í alt er hetta ein framúr frásøgn. Elsa hevur lagt dent á, at hon skuldi ikki framhevjast. Tað hevur heldur ikki verið gjørt. Men fyri tað kann sigast, at Elsa hevur verið sera sterk! Hon hevur ikki bakkað fyri nøkrum, sjálvt ikki fyri sjálvum Mengistu Haile Mariam, sum var oddamaður fyri ræðuleikarnar, sum greitt er frá.

Tí er gott, at hendan søgan er niðurskrivað.

## Hvat er síðan hent í Etiopia?

**Eg flutti heim í 1992. Her skal í stuttum greiðast frá hvussu tað síðan hevur gingist við Etiopia:**

Aftur í 1995 varð hungursneyð, sum serliga herjaði í sunnara parti av landinum.

Hetta ár varð eisini samtykt ein nýggj stýrisskipan, sum býtti landið upp millum tey ymisku fólkasløgini við ávísum sjálvstýri. Hetta var ein broyting frá tí eindarstati, sum Etiopia hevði verið, og har amaharar vóru teir leiðandi.

Tað varð eisini hildið val, men tað varð boykottað av parti av andstøðuni. Hetta førdi til hóphandtøkur. Amnesty International stúrdi fyri gongdini við mannarættindum.

Negasso Gidada gjørdist forseti, meðan fráfarandi forsetin Meles Zenawi gjørdist forsætisráðharri. Teir seytjan stjórnarlimirnir skuldu umboða so stóra breidd sum gjørligt av fólkasløgunum í landinum.

Fyrst í 1998 var aftur hungursneyð, sum hótti milliónir. Samstundis vóru tey fátæku hótt av stórum príshækkingum, sum stjórnin ásetti.

Í 2002 avdúkar ein frágreiðing frá UNICEF, at 100-200.000 etiopisk børn liva á gøtuni, har tey verða útnyttað eisini kynsliga við vanda fyri at verða smittað av AIDS, sum eisini ofta er orsøkin til, at foreldrini eru deyð.

Í 2003 er aftur hungursneyð størri enn nakratíð. Hesa ferð eru 12-13 mill fólk heft at matvøruhjálp.

Tað var lítið frægari í 2004, tá ið 7 mill tørvaðu hjálp. Men í summum økjum regnaði kortini so mikið, at kornframleiðslan øktist við 40%.

Valið í 2005 varð vunnið av forsætismálaráðharranum Meles Zenawi. Men hann varð lagdur undir valsvik og tað hildu eygleiðarar frá ES eisini. Hetta førdi til ófrið, har 200 mótmælisfólk vórðu dripin.

Pressufrælsið varð skert. Tað blivu støðugt færri óheft bløð. Blaðfólk vórðu eisini stevnd fyri rættin við ákærum, sum kundu føra til deyðarevsing.

Jólaaftan 2006 gjørdi Etiopia við amerikanskum stuðli innrás í Somalia eftir, at islamiskir dómstólar høvdu tikið valdið. Etiopia hevur júst boðað frá, at tað fer at taka sínar deildir heim aftur fyrst í komandi ári.

Stutt sagt kann sigast, at tað gongur framá í Etiopia, men tað gongur sera spakuliga. Tað allarseinasta, sum frættist nú um dagarnar, var ein verkætlan, har tað varð framleitt gass og harvið orka burturúr mykju. Í tann mun hetta eydnast kann hetta lætta munandi um korini hjá landbúnaðinum.

**Um Eritrea kann í stuttum sigast:**

Í 1993 varð Eritrea viðurkent sum sjálvstøðugur statur. Uppreistrarleiðarin Esaias Afewerki gjørdist forseti. Hann stýrir landinum einaveldugt við harðari hond.

Val vera ikki hildin. Allir óheftir fjølmiðlar eru bannaðir. Tey sum eru ímóti stjórnini hvørva med alla.

Tað búgva um 5 mill fólk í Eritrea, helvt um helvt muslimar og koptisk kristin. Aðrar kristnar samkomur eru bannaðar, og tey sum ganga ímóti hesum verða forfylgd á grovasta hátt. Slík verða sperrað inni í bingjum undir ræðuligum umstøðum.

Eitt dømi um hetta er gospelsangarinnan Helen Berhane, sum hevur sitið føst i eini bingju í eitt ár. Men Amnesty International tók hana sum samvitskufanga. Nú er hon sloppin leys og er flutt til Danmarkar saman við dóttir síni.

Tað ber til at lesa meira um hana á Google.

Viðurskiftini við Etiopia hava ikki verið nakað serlig. Í 1998 var ein nýggjur bardagi um ein týdningarleysan marknaðarbý.

Eitt eyðkenni fyri Eritrea er eisini, at teir vilja ikki hava menningarhjálp frá øðrum. Serliga ikki um treytir fylgja við.

Men hetta ger ikki støðuna hjá fólkinum betri. Men fólkið livir tó í ein vissan mun upp til orðatakið, at neyð lærir nakna kvinnu at spinna.

***Komandi Miðvika***
*Í komandi parti koma vit aftur til ættina hjá Skora Pól, sum vit hava umrøtt í røðini Hendur ið Sleptu*

Sosialurin